Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 21/2019, viðvíkjandi umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið.

Spurningurin var soljóðandi:

1. *Kann landsstýrismaðurin tryggja, at avtalan um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið ikki verður broytt, og at bygt verður í Vágum?*
2. *Ætlar landsstýrismaðurin at játta pening til bygningin á komandi fíggjarlóg?*
3. *Og um so er, kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær bygningurin væntandi verður liðugur?*

Svar:

Svarað verður undir einum:
Ætlanin er, enn sum áður, at fara undir at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið og eru ongar ætlanir um at broyta staðsetingina. Á fíggjarlógaruppskotinum 2020 er peningur settur av til umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið.
Landsverk arbeiðir í løtuni, í tøttum samstarvi við Sjóvinnustýrið, við at gera kravspesifikatiónir til umsitingarbygningin.
Nær bygningurin kann væntast at standa liðugur veldst bæði um innkomnu tilboðini og játtan á fíggjarlógini. Lagt kann verða afturat, at Landsverk metir, at tað tekur umleið eitt ár frá tí at byrjað verður at byggja, til tað kann vera klárt at flyta inn í hølini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 26. november 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður